

– Skulu vit hava eitt nærri tilknýti til ES, mugu vit vita púra greitt, hvussu fiskivinnupolitikkurin "figurerar" í øllum hesum spælinum, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, tekur til. Her situr hann í práti við norska fiskimálaráðharran

Mynd: Vilmund Jacobsen

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður:

# Avgerðarrætturin varðveitast á føroyskum hondum

**- Fiskivinnan er ein so stórur og týðandi partur av okkara samfelag, at avgerðarrætturin á fiskivinnuøkinum ikki kann sleppast av hondum í einum møguligum ES-limaskapi, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FØROYAR OG ES
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skulu Føroyar umfatast av limaskapi í ES?

Soleiðis ljóðar ein av spurningunum í spurnarkanningini, sum Fynd júst hevur gjørt.

Úrslitið av svarunum, sum tey spurdu hava givið, er søguligt á tann hátt, at hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at ein meiriluti av teimum, sum svara ja ella nei, eru fyri ES-limaskapi.

40% taka undir við, at Føroyar gerast limur í ES, meðan 36,5% siga nei til limaskap.

Havast skal í huga, at út við ein fjórðingur av teimum spurdu vita ikki – ella eru í iva um føroyskan ES-limaskap.

### Eingin "útsøla"

Tað er eingin loyna, at ein teirra, sum hevur verið heitur talsmaður fyri einum nærri føroyskum tilknýti til ES – fyri ikki at siga beinleiðis ES-limaskapi - er formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, sum eisini er vinnulívsmaður.

Tá ið okkara fiskimálaráðharri, Bjørn Kalsø, eisini er sambandsmaður, hava vit spurt hann, hvat hann heldur um úrslitið av kanningini, sum Fynd hevur gjørt.

Bjørn leggur dent á, at Sambandsflokkurin onga felags niðurstøðu hevur um møguligan føroyskan ES-limaskap.

- Hetta er eitt ógvuliga viðbrekið mál, serliga við atliti til okkara fiskivinnu, sum er so stórur og avgerandi partur av okkara lívsgrundarlagi.

Bjørn Kalsø heldur, at kanningin hjá Fynd skal takast við varsemi og fyrivarni, tá ið ein so stórur partur av teimum spurdu, eru í iva.

Landsstýrismaðurin er avgjørt ikki fyri, at føroyingar fara at ofra stýringina av fiskivinnupolitikkinum í einum limaskapi við ES.

- Avgerðarrætturin á fiskivinnuøkinum ikki kann sleppast av hondum, leggur hann dent á.

Hann vísir á, at tá ið formaður Sambandsfloksins hevur tosað um nærri tilknýti til ES – og møguligan ES-limaskap - hevur eisini verið víst á, at Føroyar sum tjóð mugu taka fyrivarni fyri fiskivinnupolitikkinum og umsitingini av tilfeinginum í havinum.

### Samstarv úteftir

- Sjálvandi eiga Føroyar eins og onnur lond at hava samstarv út í heimin, men samstundis mugu vit á fiskivinnuøkinum hava okkara serstøðu í huga.

Bjørn Kalsø heldur, at føroyingar eiga at hyggja at, hvat okkara grannatjóðir – og tá serliga Ísland og Noregi – gera á hesum øki.

- Eg meini í hvussu er ikki, at tað hevði verið rætt av okkum at givið burtur stýringina á fiskivinnuøkinum, tá ið fiskivinnan hevur so ómetaliga stóran týdning fyri okkara samfelag, leggur landsstýrismaðurin dent á.

Hann ásannar hinvegin, at tað ikki er nøkur gongd leið hjá føroyingum at "lukka okkum úti" frá altjóða samstarvi.

- Men skulu vit hava eitt nærri tilknýti til ES, mugu vit vita púra greitt, hvussu fiskivinnupolitikkurin "figurerar" í øllum hesum spælinum, sum hann tekur til.

### Handilsavtalan

Bjørn Kalsø heldur, at tað, sum føroyingum eigur at liggja fremst í huganum, er, at okkara handilsavtala við ES verður so góð, sum yvirhøvur tilber.

- Í Tinganesi verður stórt arbeiði gjørt til tess at betra um okkara atgongd til ES, og í hesum arbeiði verður eisini strembað eftir, at vit fáa í lag eina avtalu, sum líkist fríhandli millum Føroyar og ES.

Landsstýrismaðurin sigur, at tá ið tosað verður um føroyskan ES-limaskap, er talan um heilt onnur viðurskifti enn bert eina handilsavtalu, tí tá hongur so ógvuliga nógv annað uppi í hesum.

- Eg eri avgjørt ikki fyri, at vit geva avgerðarrættin á fiskivinnuøkinum frá okkum, leggur Bjørn Kalsø enn einaferð dent á.

# Etiskir spurningar kloyva tjóðina

**Føroyska fólkið er í tvíningum, tá støða skal takast til sokallaðar etiskar spurningar. Tað vísir nýggj veljarakanning hjá Fynd**

VELJARAKANNING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

400 føroyingar svaraðu í seinastu viku spurningum í sambandi við stóra veljarakanning hjá Fynd. Partur av hesi veljarakanning snúði seg um sokallaðar etiskar spurningar sum t. d. fosturtøka, støða teirra samkyndu, rúsdrekkalóggávan, sambandið millum stat og kirkju og orðingarnar um kristindómin í útkasti til nýggja føroyska stjórnarskipan.

Og endaligu tølini gera greitt, at føroyska fólkið er í tvíningum í sambandi við slíkar spurningar (sí spurningar og úrslit niðast á síðuni). Veljarakanningin avdúkar, at slíkir spurningar kloyva tjóðina í tvey. Onkustaðni hómast ein støddarmunur millum ja-sigarar og nei-sigarar til ymsu spurningarnar, men í heila tikið er trupult at fáa eyga á markantar meirilutar og minnilutar. Í øllum fimm spurningum, Fynd setti føroyska veljaranum, er talan tvørturímóti um tveir javnar bólkar, sum býta seg kring miðjuna.

### Spurningarnir

Fimm spurningar vórðu orðaðir í sambandi við júst henda partin av kanningini. Í spurninginum um at skoyta "kynsliga orientering" uppí grein 266b í revsilógini, sum varð samtykt í tinginum fríggjadagin, svarar helvtin av teimum spurdu nei, meðan 38 prosent siga ja. Viðvíkjandi spurninginum um, hvørt fosturtøka skal vera lóglig fram til 12. viku ella ikki, liggja partarnir stavn um stavn, meðan um 10 prosent siga seg ikki vita. Síðani ynskir ein hampiligur meiriluti á 57 prosent, at rúsdrekka skal kunna keypast í matvøruhandlum, og í fjórða spurninginum er sera javnt í spurninginum um, hvørt orðingin um kristindóm í grein 11 í útkasti til nýggja føroyska stjórnarskipan skal standa har ella ikki. Í seinasta spurninginum, sum snýr seg um relatiónirnar millum løgting og fólkakirkju, eftir at fólkakirkjan er yvirtikin, er ein lítil meiriluti á 48 prosent ímóti at privatisera fólkakirkjuna, sum t. d. Svøríki gjørdi í 2000, sum norska stjórnin nú er farin í holt við, og sum dúgliga verður kjakast um í Danmark.

### Tvíningar

Niðurstøðan til henda partin av kanningini hjá Fynd tykist vera, at sonevndir etiskir spurningar býta føroyska fólkið í tvey. Og tað ger tað trupult hjá politisku flokkunum at taka slíkar spurningar upp sum floksmál. Bæði løgmaður og andstøðuleiðari hava annars rørt fram undir, at slíkir spurningar møguliga áttu at verið viðgjørdir sum floksmál undir komandi landsfundum, men kanningin bendir á, at tað kann koma at kosta dýrt at taka støðu til slíkar spurningar, t. d. í eini stevnuskrá. Flestu føroysku flokkarnir hava nevniliga ikki havt ta siðvenju at organisera seg í mun til slíkar spurningar áður.

Stóri spenningurin er so, hvussu politisku flokkarnir fara at fyrihalda seg til slíkar spurningar í framtíðini, og í hvønn mun spurningar um m. a. fosturtøku, rúsdrekka, fólkakirkju, samkynd o.s.fr. fara at mynda eitt komandi valstríð um eitt lítið ár.

**Skal »kynslig orientering« skoytast upp í grein 266b í revsilógini?**

| | | |
|---|---|---|
| Ja | 182 | 38,72% |
| Nei | 236 | 50,21% |
| Veit ikki/vil ikki svara | 38 | 8,09% |
| Ógreitt | 14 | 2,98% |
| **Tilsamans** | **470** | **100,00%** |

**Skal frí fosturtøka verða lóglig fram til 12. viku?**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ja | 199 | 42,34 |
| Nei | 206 | 43,83 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 52 | 11,06 |
| Ógreitt | 13 | 2,77 |
| **Tilsamans** | **470** | **100,00%** |

**Skal tað bera til at keypa alkohol í matvøruhandlunum?**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ja | 270 | 57,45 |
| Nei | 190 | 40,43 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 8 | 1,70 |
| Ógreitt | 2 | 0,43 |
| **Tilsamans** | **470** | **100,00%** |

**Í útkasti til nýggja stjórnarskipan stendur, at »Løgtingið kann veita kristnitrúnni serligar sømdir, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir«. Skal tílík orðing við í nýggja stjórnarskipan?**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ja | 165 | 35,11 |
| Nei | 206 | 43,83 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 93 | 19,79 |
| Ógreitt | 6 | 1,28 |
| **Tilsamans** | **470** | **100,00%** |

**Fólkakirkjan erí dag partur av statinum, Skal henda støða verða galdandi eftir at løgtingið ehvur yvirtikið fólkakirkjuna?**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ja | 229 | 48,72 |
| Nei | 178 | 37,87 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 61 | 12,98 |
| Ógreitt | 2 | 0,43 |
| **Tilsamans** | **470** | **100,00%** |